

Richard Mortensen er stjóri á FT-Samskifti



Henrik Dahl, sosiaologur, rithøvudnur og kronikkhøvundur fer at hugleiða um fortíð og samtíð



Ulrik Wilbek, fyrrverandi hondbóltslandsliðsvenjari fer at tosa um at fáa íblástur

# Kom og royn markleysa heimin

**Á serstøkum temadegi fyri vinnufyritøkur og stovnar hósdagin 9. november 2006 í høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Klingruni í Hoyvík, verður møguleiki at síggja og royna tað nýggjasta innan samskiftistøkni**

SAMSKIFTISTØKNI

»Kom og royn markleysa heimin« er heitið á serstøkum temadegi, sum Føroya Tele bjóðar vinnufyritøkum og stovnum í Klingruni í Hoyvík.

Endamálið við degnum er at vísa fram og royna nakrar av verandi tænastum saman við nýggjum tænastum, sum vit fara at bjóða í næstum.

Føroya Tele leggur dent á at veita nýggjar og tryggar tænastur, serliga væl egnaðar til vinnulívið. Á fáum økjum er hent so nógv sum á samskiftisøkinum seinastu árini, og er hendan gongdin ikki steðgað – langt frá. Umframt ein lættari arbeiðsdag er, bæði í tíð og pengum nógv at spara, bæði tíð og pengar, við nýggjastu tøknini.

- Av nýggjum tænastum sum vit fara at bjóða kunnu nevnast, Breiðbandstelefoni (VoIP), Hýsing, Lommy og Sjóvinnutænastur. Um hetta og mangt annað fæst meiri at vita á temadegnum, sigur Ricard Mortensen, stjóri á FT-Samskifti.

Eisini verða tveir sera áhugaverdir fyrilestrar á degnum:

## Ein tíð í broyting

Fyrri fyrilestrarhaldarin er Henrik Dahl, sosiologur og íðin fyrilestrahaldari, umframt rit- og kronikkhøvundur.

Í dag verður nógv tosað um, at alt gongur skjótari og skjótari og um, hvussu ógvusligar tær broytingar eru, sum henda hvønn dag. Men verður hugt yvir tíð, kann spurnartekin setast við um so er. Kanska er tað nútíðin sum er støðug og góðu gomlu dagarnir vóru óvissir og óstøðugir - við umfatandi broytingum í gerandisdegnum? Í sínum fyrilestri fer Henrik Dahl at hugleiða um fortíð og samtíð - broytingar undir heitinum “Mindernes land”

## Fá íblástur frá Ulrik Wilbek

Ulrik Wilbek veit, hvat hann tosar um, og hevur víst hetta í verki. Í fyrilestrinum fer hann at tosað um sínar royndir við ymiskum motivatiónsstrategium, bæði hvussu hann hevur fingið sínar spælarar at verða sjálvmotiveraðar og hvussu leiðarin við íblástri og ávirkan kann fáa liðið at arbeiða sum eina eind.

Ulrik Wilbek, landsliðsvenjari var í fjør innstillaður til heitið ársins leiðari í Danmark saman við fremstu vinnuleiðarum í Danmark.




# ECB ábendingar um hægri rentu

MARKNAÐARRÁK

Evropiski miðbankin lat rentuna vera verðandi á 3,25% hósdagin í farnu viku. Hetta var væntað í marknaðinum, og áhugin var tí størstur fyri, hvat Trichet fór at siga á tíðindafundinum. Íleggjarar høvdu væntað okkurt um rentugongdina í 2007, men hetta segði hann einki um. Hann gav ábendingar um, at ECB fer at hækka rentuna í desembur, eins og marknaðurin væntaði. Hann óttaðist ikki fyri evropiska búskapinum, men legði dent á, at vandi enn er fyri skjótt hækkandi brúkaraprísum, og at um hetta gerst veruleiki, verður rentan hækkað enn meir. Hinvegin nevndi hann, at um búskapurin í USA fer at minka av álvara, fer hetta eisini at tálma evropiska búskapinum. Tó metti hann, at lækkaði oljuprísurin betrar viðurskiftini í Evropa. Hvørki láns- ella partabrævamarknaðirnir ávirkaðust stórliga av ECB. Úttalilsini hjá Trichet gera, at eyguni hendan mánaðin serliga verða havd við øllum, ið kann benda á trýst á prísvøksturin.

## Lánsbrævarentur lækkaðar

Í farnu viku lækkaðu lánsbrævarenturnar, so íleggjarar aftur fingu kursvinning. Danska 10-ára rentan er 3,82%, og hon er sostatt enn lægri enn 1-árs rentan. Hetta er eisini galdandi til dømis í Bretlandi og USA.

## ISS-stjórar til Keops

Fyrrverandi ISS stjórarnir Eric Rylberg og Karsten Poulsen eru settir í starv í fastognarfelagnum Keops. Ætlanin er at teir báðir skulu skapa størri álit og trúvirði um framsóknu vakstrarætlanina hjá felagnum. Íleggjarar tóku væl ímóti tíðindunum og fekk hetta partabrævakursin at hækka 20% og er hann nú 27,1.

## Hesa vikuna

Eftir tvær hendingaríkar vikur á marknaðunum, verður kanska eitt sindur friðarligari hesa vikuna. Tað týdningarmesta verða fleiri límir í amerikanska tjóðbankanum, sum fara at úttala seg um búskapin har. Annars skulu seinastu tíðindini sodnast, og eyguni verða havd við oljuprísinum.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 586,12 | 0,1% | ↑ |
| JPY | 4,95 | -0,6% | ↓ |
| GBP | 1.112,23 | -0,1% | ↓ |
| NOK | 90,26 | 1,3% | ↑ |
| SEK | 81,36 | 0,7% | ↑ |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,46 | 0,1% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 120,99 | 2,0% | ↑ |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** | |
| Atlantic Petroleum | 592,00 | 0,3% | ↑ |
| KB Trygg Eurostoxx | 106,35 | -0,3% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

Vika 45